# 42. umboðsráðsfundur FKF 2010

## Formansfrágreiðing

FØROYA KOMMUNUFELAG

## 1. Inngangur

Góðan dagin góðu fundarfólk og hjartaliga vælkomin til tann 42. umboðsráðsfundin hjá Føroya Kommunufelag.

Eg skal, í hesi næstu formansfrágreiðing míni í hesi setuni, greiða frá virksemi felagsins í farna ári.

Seinasta árið hevur í stóran mun verið merkt av stóru búskaparkreppuni, ið hevur rakt allan heimin. Kommunurnar í Føroyum eru heldur ikki slopnar snikkaleysar undan hesari kreppu. Skattainntøkurnar eru víkjandi, og í nógvum kommunum er skuldarbyrðan aftur við at gera seg galdandi. Hetta hevur havt við sær, at flestu kommunur hava táttað í, bæði viðvíkjandi íløgum og rakstri, eins og nógvar kommunur hava sæð seg noyddar at hækka skattin. Stórar avbjóðingar liggja fyri framman eisini hjá okkum kommunustýrislimum hetta komandi árið, hóast útsagnir, uttan úr heimi og her hjá okkum, kanska benda á at kreppan er við at hæsa av.

Sum altíð, hevur virksemið hjá felagnum í stóran mun verið treytað av teimum ætlanum, sum landspolitiski myndugleikin hevur sett sær fyri at fremja í einari setu. Og stórum og glæsiligum ætlanum hava tað verið nokk av frá landsins síðu, hetta seinast árið.

Her hava verið bæði pakkar, reformar og avrikslistar. Ólavsøkupakkin og vakstrarpakkin, eins og reformar á fiskivinnuøkinum, skúlaøkinum og ikki minst á kommunala økinum. Ætlanirnar eru helst nógvar og góðar, men tað tykist sum um, at so skjótt hesar ætlanir hava sæð dagsins ljós, so kemur stígur í og allar ósemjurnar koma undan kavi, og alt tykist steðga, nærum áðrenn tað er byrjað.

Nógv bendir á, at ósemjur í landsins leiðslu verða loystar við at leggja mál í nevndir og arbeiðsbólkar við stórum yvirskriftum. Málini byggja ikki á politiskar semjur, men eru oftani úrslit av, at hvør landsstýrismaður arbeiða í sjálvdrátti við egnum prestiguprojektum, sum als ikki eru fyrireikað og grundfest politiskt.

Hetta er eingin gongd leið, og trúvirðið á politisku skipanina er sum heild eisini hareftir. Fyri kommunurnar er hetta heldur ikki nøktandi. Eingin yvirskipað ætlan tykist vera á kommunalpolitiska økinum, og útmeldingarnar úr ymisku ráðunum eru ofta mótstríðandi.

## 2. Umskipan av kommunala geiranum

Virksemi felagsins, eins og kommunalpolitiska dagsskráin annars, hevur verið nógv merkt av, at landsstýrið í januar setti ein arbeiðsbólk, at gera uppskot til ein kommunalreform.

Landsstýriskvinnan setti í januar 2009 tí sonevndu kommunalu umskipanarnevndina við hesum arbeiðsetningi.

- Nevndin skuldi, við støði í løgtingslóg um kommunusamanleggingar og kommunal samstørv, koma við tilmæli um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skuldu verða og hvussu hesar skuldu skipast.

- Nevndin skuldi koma við einum uppskoti til javningarskipan, soleiðis, at allar kommunur kundu verða javnsettar mótvegis lóggávuni, og kunna loysa tær somu uppgávurnar. Javningarskipananin skuldi fevna um bæði inntøku- og útreiðsluútjavning

- Nevndin skuldi koma við einari greining av einum greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Gerast skuldi ein ítøkilig raðfesting, ið ásetti hvørji øki, í

hvørjari raðfylgju og nær hesi verða løgd til kommunurnar. Fyrsta stóra økið skuldi verða lagt til kommunurnar 1. januar 2011.

- Nevndin skuldi koma við einum uppskoti um ein blokkskipan, soleiðis, at tað ikki var neyðugt at broyta verandi skattaskipan hjá landi og kommunum.
- Nevndin skuldi til seinast koma við einari eftirmeting av, hvussu tað hevur eydnast at lagt dagstovnaøkið og barnaverndarøkið út til kommunurnar, og í hesum sambandi gera ein eftirmetingarleist, sum eisini kundi brúkast í samband við, at onnur øki verða løgd út.

Eftir ætlan skuldi nevndin verða liðug við álitið á Ólavsøku. Hetta bleiv seinni broytt og álitið var handað landsstýriskvinnuni 1. oktober 2009.

Nevndin kom við tilmæli um 7 kommunur, samsvarandi teimum økjum, sum løgtingslóg um kommunusamanleggingar og kommunal samstørv ásetur. Alternativið var 9 kommunur, har Vestmanna og Kvívík varð ein sjálvstøðug kommuna og Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna somuleiðis gjørdust ein sjálvstøðug kommuna.

Nevndin kom við uppskoti um, at verandi kommunustýri skuldu avtakast 1. januar 2011, og at val til nýggju komunnustýrini skuldi vera longu 9. november í ár.

Nevndin mælti til, at fyrsta stóra økið, fólkaskúlaøkið, verður lagt út 1. januar 2012, og næsta stóra økið, eldraøkið, 1. januar 2013.

Harumframt viðgjørdi bólkurin eina javningarskipan, tó uttan at koma við nøkrum ítøkiligum uppskoti, hvussu ein slík skuldi síggja út og hvussu stór útjavningin skuldi verða. Hetta metti bólkurin vera ein politiskan spurning.

Í arbeiðssetninginum var bólkurin biðin um at koma við einum uppskoti til eina blokkskipan. Men bólkurin mælti frá, at innføra eina blokkskipan, millum annað við tí grundgeving, at ein blokstuðulsskipan er avmarkandi fyri kommunala sjálvræðið. Í staðin mælti bólkurin til at eina endurrindingarskipan, har allir frádráttir vóru lagdir á landskassasíðuna.

Arbeiðsbólkurin legði í tilmælinum stóran dent á, at umskipanin var ein samlaður pakki, soleiðis at skilja, at skuldu kommunurnar skipast í størri eindir, so var fyritreytin eisini, at øki skuldi leggjast kommununum at umsita, eins og útjavningarskipan skuldi gerast. Talan skuldi sostatt ikki vera um bert at leggja kommunur saman.

Men sum vanligt, freistast mann at siga, stungu ósemjurnar seg upp beint sum álitið var handað. Landsstýrisflokkarnir tykjast ikki at vera samdir um, hvørt kommunurnar skulu skipast við lóg ella við sjálvbodnari samanlegging, eingin semja tykist verða um at leggja størri málsøki til kommunurnar og tíðarætlanina er heldur eingin undirtøka fyri.

Vit kunnu bara staðfesta, at undirtøka ikki hevur verið fyri sjálvum arbeiðssetninginum, hóast hesin hevur verið góðkendur á landsstýrisfundi.

Ivaleyst eru limakommunurnar í Føroya Kommunufelag eisini sera ójavnar á máli um niðurstøðurnar hjá nevndini. Fyrst av øllum tykist ikki vera stórvegis undirtøka fyri, at avtaka verandi kommunustýrir, við tí fyri eyga at stovnseta nýggjar kommunalar eindir, longu 1 januar 2011. Flestu meta, at reformurin ikki eigur at fáa virknað fyrr enn hetta valskeiðið er komið at enda. Men tað er framvegis eisini stór ósemja um tann kanska mest grundleggjandi spurningin, hvørt kommunurnar skulu finna saman í størri eindir sjálvboðið ella um hetta skal tvingast ígjøgnum við lóg.

Føroya Kommunufelag hevur altíð talað fyri, at kommunusamanlegging skal fara fram sjálvboðin, men tað er heldur eingin loyna, at tað eru alsamt fleiri røddir innan Kommunufelagið, sum halda at hesin leistur ikki ber á mál og at sjálvbodna samanleggingin gongur alt ov seint.

Tá ið nevndin bleiv sett í januar 2009 var stýrið samt um, at seta umboð í nevndina, og síðani lata nevndina fáa arbeiðsfrið og koma við sínum tilmælum. Nevndin er komin við sínum tilmælum, og hóast helst nógv er at finnast at, so meti eg álitið vera eitt gott grundarlag fyri víðari arbeiðinum, at umskipa kommunala geiran og fáa eitt greiðari uppgávubýti millum land og kommunur og, ikki minst, kommununum eitt størri málsræði.

Frágreiðingin um umskipan av kommunala geiranum var lagt fyri tingið í gjár, og aðalorðaskifti verður hósdagin 25. februar.

### 3. Skúlareformurin

Eisini hevur landsstýriskvinnan í mentamálum boðað frá einum sokallaðum skúlarformi.

Yvirskipaða ætlanin við reforminum er, at geva landsstýriskvinnuni størri fyrisitingarligar heimildir til, í semju við kommunurnar, at broyta skúlabygnaðin soleiðis, at skúlarnir kunnu verða samskipaðir í størri skúlaeindir. Sambært uppskotinum skulu kommunurnar ganga saman í skúlasambond til, heilt ella lutvíst, at skipa síni viðurskifti í felags skúlaøki. Tímajáttanin skal framyvir játtast til skúlaøkini, í staðin fyri til tann einkulta skúlan.

Finna kommunurnar ikki semju um hvussu skúlasambondini skulu skipast, tað vil siga hvørjir skúlar skulu halda áfram og hvørjir skulu steingja, ja, so fær landsstýriskvinnan óavmarkaðar heimildir til at fara inn og skipa skúlabygnaðin. Lítil ivi man vera um, at tað verður trupult at finna semjur í flestu økjum landinum.Tí merkir uppskotið í veruleikanum, at kommunurnar missa allan ræðisrættin á økinum.

Hóast tað sambært uppskotinum verður lagt upp til at vit fáa okkurt slag av økisumsitingum, so er einki nágreiniligt um, hvussu hesar fyrisitingar fíggjarliga-, bygnaðarliga- og landafrøðiliga skulu skipast

Føroya Kommunufelag tekur fult undir við ætlanunum, at endurskoða bygnaðin á fólkaskúlaøkinum, við tí fyri eyga, at styrkja fakliga innihaldið í skúlanum og tryggja, at vit fáa sum mest burturúr fíggjarliga tilfeinginum. Men uppskotið hjá Mentamálaráðnum loysir ongar trupulleikar, men heldur hinvegin, letur upp fyri hópin av ósemjum millum land og kommunur, og kommunurnar ímillum.

Felagið hevur tí mælt Mentamálaráðnum til, at ráðið greitt boðar frá hvørjar yvirskipaðar ætlanir ráðið hevur. Er ætlanin,at landið skal taka fulla ábyrgd av skúlanum, ella eru ætlanir um, at skúlin skal leggjast kommununum at umsita? Sambært uppskotinum verður fólkskúlin framhaldandi eitt býtisbarn ímillum land og kommunur. Í veruleikanum er her talan um eitt afturstig, í mun til ætlanirnar, at fáa eitt greiðari uppgávu- og fíggjarligt ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Felagið mælti somuleiðis Mentamálaráðnum til, at ráðið tryggjar sær, at arbeiðið við bygnaðarbroytingum á fólkaskúlaøkinum, er í samsvar við ætlanirnar um bygnaðarbroytingar á kommunala økinum.

Tá hesi viðurskifti eru komin í rættlag, eigur Mentamálaráðið í samráð við kommunufeløgini, at fara undir neyðugar bygnaðarbroytingarnar á fólkaskúlaøkinum.

Hetta ófullfíggjaða uppskotið vísir kanska einamest, hvussu lítil samanhangur er ímillum arbeiðini í ymisku ráðunum, eins og innanhýsis í einstøku ráðunum. Samstundis sum Mentamálaráðið kemur við einum skúlareformi, sum tekur ræðisrættin frá kommunala myndugleikanum, so luttekur ráðið paralelt í arbeiðinum viðvíkjandi kommunalreforminum, sum mælir til, at kommunurnar taka fulla ábyrgd av fólkskúlanum. Tað tykist mær, at vinstra hond ikki veit, hvat høgra ger.

Tað er tó eisini positivar hendingar farnar fram í mun til fólkaskúlaøkið. SSP samstarvið er umsíðir komið í fasta legu, og farið at virka.

SSP-samstarvið er tvørfakligt samstarv millum Mentamálaráðið, Almannaráðið løgregluna og kommunufeløgini – partar sum arbeiða ella umsita stovnar, sum hava samband við børn og ung.

Endamálið við SSP-samstarvinum er, at skapa samskipaðar karmar og umstøður kring landið, til tess, at fremja felags atgerðir, sum fyribyrgja og minka um tey fyribrigdi, ið elva til kriminalitet og skaðandi atburð millum børn og ung.

SSP-samstarvið hevur sum mál, at byggja upp, brúka og røkja faklig netverk, sum hava fyribyrgjandi og mennandi ávirkan á gerandisdagin hjá børnum og ungum.

SSP ráðgevi er settur og heldur hann til Barnaverndarstovu Føroya.

Nýligani var nýggjur sáttmáli eisini undirskrivaður millum kommunufeløgini og Mentamálaráðið um, at halda áfram við undirvísingarportalinum SNAR.

Undirvísingarportalurin var liðugt mentur í vár, og síðani hevur verið arbeitt við, at fylla tilfar inn og gera tað so lætt atkomiligt, sum til ber. Trý fólk arbeiða á portaltoyminum hjá Føroya Skúlabókagrunni, og í dag hevur Snar á leið 1500 ymiskar síður innan nógv ymisk øki.

Komandi árini er ætlanin, at leggja enn meira tilfar út, gera portalin meira fjølbroyttan og samvirknan, og málrætta ymisku síðurnar, so bæði smá børn, ung og øll onnur fáa sum mest burtur úr.

## 4. Almannaøkið

### Umskipan av økinum børn og ung

Landsstýriskvinnan í almannamálum setti, í mai 2009, ein arbeiðsbólk, at leggja fram álit um, hvussu tilboð og skipanir til børn, ung og familjur við serligum tørvi, eftir forsorgar-lógini og barnaverndarlógini, kunnu skipast á mest skynsama hátt. Hetta soleiðis, at øll børn, ung og familjur við serligum tørvi fáa nøktandi tilboð í Føroyum. Arbeiðsbólkurin er nú liðugur og álitið sent okkum til hoyringar.

Arbeiðsbólkurin bleiv settur eftir, at, millum annað, mikil orrusta stóðst av ætlanunum hjá landsstýriskvinnuni, at flyta børn við atferðartrupulleikum niðan í Mjørkadal. Kommunufeløgini gjørdu, saman við Barnaverndarstovuni, vart við, at kommunalu barnaverndartænasturnar als ikki vóru tiknar við uppá ráð, í samband við, at stórar broytingar vóru vøru gjørdar á stovnsøkinum børn og ung. Tað eru hóast alt kommunalu barnaverndartænasturnar, sum nýta stovnarnar hjá landinum í barnaforsorgarmálum.

Arbeiðsbólkurin hevur havt 3 kommunal umboð, og handaða álitið, verður nú viðgjørt av stýrinum í felagnum, og er annars tøkt hjá øllum at viðmerkja á heimasíðuni hjá Almannaráðnum fram til 5. mars.

**Eldraøkið**

Fíggjarligu inntrivini hjá Almannaráðnum á eldraøkinum hava eisini fingið nógva umrøðu seinastu tíðina. Fyri at fremja sparingar á almannaøkinum var egingjaldið, bæði á sambýlum og røktarheimum, munandi økt.

Føroya Kommunufelag hevur í mong ár gjørt vart við, at leigan á sambýlum er ov lág og, at kommunurnar ynskja at hækka leiguna. Men hetta hevur verið, sum at sletta vatn á gás. Nú landskassanum tørvar pening vóru, frá degi til dags, lagdar 2000 kr. oman á leiguna hjá teimum eldru, sum gjald fyri heimarøkt. Allur peningurin fer í Landskassan og kemur ikki kommununum til góðar. Avleiðingarnar eru, at útlitini fyri, at kommunurnar komandi mongu árini fáa møguleika, at hækka leiguna hjá teimum, sum búgva á sambýlunum, ikki er til staðar. Tað ber jú illa til at royta ein skallutan.

Eftir øllum at døma, verður eldraøkið ímillum fyrstu økini, ið skal leggjast út til kommunurnar at umsita. Men tað er neyðugt, at land og kommunur gera sær greitt, at hetta økið í framtíðini verður sera útreiðslukrevjandi. Tí mugu kommunurnar krevja, at hædd verður tikin fyri hesum, tá ið fíggjarligar broytingar skulu gerast millum land og kommunur.

Føroya Kommunufelag ger sítt til, at fyrireika kommunurnar til yvirtøku av eldraøkinum, millum annað við luttøku í altjóða verkætlanum.

**5 Verkætlanir**

Ole2 **Verkætlanin Okkara Lív sum Eldri – iíverksetan**

Tvørtjóðarliga vekætlanin er annar partur av tveimum, og var felagið eisini við í fyrra partinum. Okkara virksemi er í partsætlanini NETVERK, har vit luttaka saman við Luleå í Svøríki og Oulu í Finlandi. Arbeiðið fyrigongur í Porkeris og Sunda kommunum og Felagskommununi í Vágum. Endamálið er, at seta ígongd tiltøk, sum hækka lívsgóðskuna hjá heimabúgvandi eldri borgarum.

Talan er um tvey sløg av virksemi, har eldri eru saman um virknan gerandisdag.

Í fyrsta lagi, at brúka alótina at samskifta á. Her er Landsfelag pensionista við, sum yvirtekur heimasíðuna, tá verkætlanartíðin er av. Heimasíðan eitir www.eldri.fo. Her kunnar Landsfelagið um kor teirra eldru, og pensionistafeløgini kunna um sítt virksemi.

Í øðrum lagi, at kommunan stuðlar uppundir virksemi, har eldri borgarar í felag eru við til at skapa ein virknan gerandisdag. Eitt av málunum er økt virksemi millum eldri borgarar og yngri ættarlið.

Tá verkætlanin er liðug komandi ár, vænta vit at hava eina hándbók, sum kann leiðbeina kommunum, her og uttanlands, um hvat skal til og um framgangsháttir til at byrja líknandi virksemi.

Innan stutta tíð, er heimasíðan hjá verkætlanini,www.ourfuture.eu føroyskað.

Northern Periphery Programme 2007–2013

Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future

European Union
European Regional Development Fund

**Forsight verkætlan**

Føroya Kommunufelag hevur júst fingið játtað luttøku í verkætlanini "Vestnorden Foresight 2030 – bygdernes fremtidsvisioner", saman við millum annað Íslendsku og grønlendsku kommunufeløgnum og Granskingardeplinum fyri økismenning.

Verkætlanin snýr seg um, hvussu útjaðarasamfeløg í útnorði kunnu standa seg í mun til framtíðar avbjóðingar. Verkætlanin fer av bakkastokki ein av fyrstu døgunum, og fara kommunurnar, at verða kunnaðir regluliga um verkætlanina framyvir.

**Agenda 21 stovan**

Agenda 21 stovan hevur seinastu árini staðið fyri ráðgeving til kommunur á umhvørvisøkinum. Felagið stovnsetti stovuna á í 2004 og hevur hon havt til húsa á skrivstovu okkara síðani.

Gott samstarv er við Innlendismálaráðið, kommunur og brúkarar, um raksturin av stovuni, og fer hettar samstarv vónandi at halda á frameftir.

Eg havi, sum kommunupolitikkari, hesi árini, fylgt við menningini á hesum økinum, og má eg siga, er nógv hent, tá tað kemur til hugburð til umhvørvið og náttúruna. Økið er upp raðfest í flestu kommunum og verkætlanir eru í gongd við orkusparing, ger av umhvørvisætlanum og náttúruvernd o.s.fr.

Av átøkum hjá Agenda 21 stovuni i 2009 kann nevnast "Grøna skjalið". Í skjalinum átaka kommunur, hvør sær og saman, at arbeiða virkið og skipað við umhvørvisspurningum. 18 kommunur hava seinasta árið samtykt hetta skjal.

Í 2010 verður virksemið á Agenda 21 stovuni víðkað til eisini at umfata Umhvørvisátakið, har kommunur, aftur í ár, fáa høvi, at kappast um Best røktu bygd, - bygdargøtu og grøna stovn.

Kommunurnar hava higartil verið í fremstu røð á burðardygga økinum her heima, og tað eiga tær, eftir mínum tykki, eisini at halda áfram við at verða.

**Fíggjarlig viðurskifti**

Sum ikki einaferð tykist kreppan, at raka ójavnt í føroyska samfelagnum. Kommunur og øki í landinum, ið eru bundin at fiskivinnuni, eru aftur meinast rakt. Hetta sama gjørdi seg galdandi í sambandi við kreppuna í hálvfemsunum.

Veruleikin er, at tann ójavni, sum er og altíð vil vera millum kommunurnar og økini í Føroyum, gerst størri í ringum tíðum.

Hetta kemst sjálvsagt av, at fiskivinnan í størri mun enn, eitt nú almenni geirin og handilsvinnan, er tengd at heimsbúskapinum.

Tí er umráðandi, at vit fáa fleiri støðug almenn og kommunal arbeiðspláss runt um í landinum. Besta loysnin er at leggja fleiri øki út til kommunurnar at umsita.

Í uppskotinum um umskipan av kommunala geiranum verður mælt til, at allir frádráttir koma at liggja í landsskattinum, heldur enn í kommunuskattinum. Hetta kann gerast í samband við, at fyrsta stóra økið verður lagt kommununum. At millum annað fiskimannafrádrátturin verður lagdur landskassanum, at fíggja, kemur, saman við einari javningarskipan, at hava við sær, at kommunurnar verða javnari settar, at taka á seg fleiri uppgávur.

## Eitt kommunufelag

Tað hava verið fundir millum kommunufeløgini um samanlegging av feløgunum, men viljin til samlegging tykist ikki, at hava verið so stórur seinastu tíðina, kanska serliga tí, at bíða hevur verið eftir kommunuálitinum. Kommunuálitið er liðugt og helst verða royndirnar, at leggja feløgini uppafturtiknar.

Tað er lítil ivi um, at eitt felag fer at kunna veita munandi betri tænastur til limakommunurnar, enn verandi tvey feløgini megna. Við at leggja fyrisitingarnar saman, verður munandi lættari hjá felagnum, at taka á seg tær avbjóðingar, ið broytingarnar av kommunala geiranum koma at hava við sær.

## At enda

Nógv tekin eru um, at stórar og søguligar broytingar fara at koma á kommunala økinum komandi árini.

Vit hava, sum felag og sum kommunur, tí stórar avbjóðingar fyri framman. Tað er neyðugt, at tann broytingin, ið nú fer fram, verður væl fyrireikað, og at hon verður grundfest politiskt við einari breiðari lands- og kommunalpolitiskari semju.

Felagið ynskir, at gjørd verður ein heildarætlan fyri kommunala økið. Ein ætlan, ið ger greitt, hvørji øki skuldu leggjast út til kommunurnar, í hvørjari raðfylgju, hvussu hesi skulu fíggjast, og hvussu ein útjavningarskipan, ið gevur øllum økjum í landinum menningarmøguleikar, skal skipast.

Føroya Kommunufelag hevur í øllum samskifti við landsmyndugleikarnar gjørt vart við hesi sjónarmið, og tað tykist sum kommunuálitið, við síni heildarætlan fyri kommunala økið, tekur hædd fyri hesum sjónarmiðum.

Tað er umráðandi, at land og kommunur finna felags stev í fyrireikingunum til stóru bygnaðarbroytingar, ið skulu fara fram. Endamálið má vera, at fáa eitt samfelag, ið mennist í javnvág, og har borgarar í øllum landinum hava rætt til grundleggjandi vælferðartænastur, og ikki, sum vit eru vitni til í dag, at nógv arbeiði snýr seg um, at flyta smávegis útreiðslur frá einum kassa til annan.

At enda fari eg at takka stýrinum, starvsfólki á skrivstovuni og tykkum øllum fyri gott samstarv seinasta árið. Eg vóni, at tær loysnir, sum vit koma fram til á kommunala økinum komandi árini, verða okkum øllum til bata, bæði limakommununum og felagnum.

Takk fyri!

70 mál vóru skrásett í FKF journalini í 2009.




*Býti av málum á journal økini*




*Býti av málum á adressatar*

## Fundarluttøka hjá umboðum Føroya Kommunufelags

Tilsamans 214 fundar- og/ella ferðapengar vóru útgoldnir í 2009.




*Býti av umboðum FKF á starvsheiti*

*grundað á útgoldnar fundar- og / ella ferðaútreiðslur*




*Býti av umboðum FKF á fundarslag*

*grundað á útgoldnar fundar- og / ella ferðaútreiðslur*